

navni, sum las búnaðarfrøði. Janus og Gemoll blivu vinmenn og gjørdu av at fara eina ferð til havnarbýin Livorno, har baðistrond er. Janus hevði svimjibuksur við og fór útí at svimja. Tá ið hann kom upp, spurdi Gemoll, um hann kundi læna hansara buksur, og tað var sjálvandi gaman í.

Eina løtu seinni, nú hoyrist róp. Tað vísti seg, at rumenin var lopin á bláman, men dugdi ikki at svimja. Tann italienski bjargarin, sum var í kritahvítum, nýpressaðum brókum, noyddist so, við ringum tannabiti, at loypa útí. Gemoll varð bjargaður!

## Ideologiirnar

Fyri føroyskum sum øðrum europeiskum listafólkum vóru tríatiárini ein avbjóðing. Atdrátturin frá ideologiiunum var sterkur, og mongum kundi tykjast, at har vóru bara tvinnir kostir í at velja. Tað fall Janusi natúrligt at gerast partur av vinstravonginum, har eisini listamenn og høvundar sum Hans Kirk, Hans Scherfig, Broby-Johansen og Halldór Laxness vóru at finna.

Men Janusar hjálpari og mentor, Gudmund Hentze, sum dyrkaði tað heroiska og var hugtikin av tí "sterka manninum", endaði við at nærkast fascismuni og nazismuni.

Í hesum sambandi er tað natúrligt at spyrja, hvat samband Mikines hevði við nazismuna. Eftir kríggið kom jú undan kavi, at hann stóð á limalistanum hjá tí danska nazistaflokkinum, og tað verður sagt, at summir listfrøðingar hava roynt at finna upprunan til hetta í eini serligari "heimstaðar-realismu við ariskari-norrønari hevd".

## Mikines var ikki nazistur

Sambært Janusi er hetta als ikki rætt. Mikines, sigur Janus, hevði einki skil fyri politikki og var – politiskt sæð – einki. Men hann hevði í tíðarskeiðum stórar trupulleikar av ymiskum slag. Nú bar so á, at hann kom í samband við fólk, møguliga í Humlebæk, sum bæði vóru rík og nazistar og eina tíð hjálptu honum peningaliga.

Mikines var veikur, tá ið tað váta slagið hevði í meira lagi av valdi á honum. Soleiðis bar tað á, at hann bleiv lokkaður at gerast limur í nazistaflokkinum. Tá ið tað rann av aftur, royndi hann at melda seg út, men tað bar ikki til. Janus ger vart við, at hann eigur eitt bræv frá Mikinesi, har hann biður seg vælsignaðan hjálpa sær burtur úr tí torføru støðu, hann er komin í.

Innlimanin fekk eftir kríggið avleiðingar, og á eini fernisering í Oslo vórðu myndirnar hjá Mikinesi tiknar niður. Men Mikines, heldur Janus fram, tók henda mótgang sum ein maður og bleiv ikki "sligin út". Her kann verða lagt aftrat, at hann ongantíð bleiv burtursagdur av tí føroyska listaliga umhvørvinum.

## Anniki Paasikivi

Janus Kamban hevði ymiskar bústaðir árini í Keypmannahavn. Ta allarfyrstu tíðina búði hann hjá skyldmanni sínum Janusi Øssursson úti á Eysturbrúgv. Eina tíð búði hann hjá Ninnu (hjá Sigmundi á Argjum), sum hann eisini var nær skyldur við. Seinni flutti hann inn í eina herskapsíbúð stutt frá jarnbreytarstøðini Eysturbrúgv og hevði atlier í erva í íbúðini. Men so skuldu hesi húsini rívast niður, so Janus flutti inn í eina íbúð á Nørrebrúgv, í fyrstu uppgongd eftir Dronning Louises brúgv.

Eftir at kríggið var byrjað, gjørdi Gudmund Hentze av at flyta úr býnum og leiga sína listamansíbúð út. Ein finsk dama, Anniki Paasikivi, setti seg í samband við Gudmund og leigaði íbúðina. Nú hendi tað, at føringar fyrireikaðu eina framsýning, sum skuldi vera í íbúðini hjá Janusi. Teir høvdu brúk fyri nøkrum verkum, sum stóðu í íbúðini hjá Gudmundi. Á henda hátt kom Anniki í samband við føringar. Hon og Janus gjørdust vinfólk.

Anniki Paasikivi var arkitektur, men starvaðist hjá Fólkasamgonguni, eitt tátíðar ST, ið var til frá 1919 til 1946. Hon kundi nú reklamera fyri føroyskari list, so tá ið framsýningin læt upp, streymaðu diplomatbilarnir til íbúðina hjá Janusi. Anniki dugdi umframt sítt móðurmál, finskt, svenskt og onnur europeisk mál. Tá ið tey finsku børnini komu til Danmarkar, bleiv hon eitt slag av sambindingarliði millum tey og tey donsku heimini, tey komu til.

Anniki var dóttir J.K. Paasikivi, sum var finskur forseti 1946-56. Hann umboðaði ta sonevndu Paasikivi-Kekkonen kósina, har endamálið var at hava hampuliga góð viðurskifti við Sovjetsamveldið og á tann hátt tryggja Finnlandi frælsi og støðufesti aftur undir tí sovjetska skugganum.

## Nonnegaard

Søgan um, hvussu Listafelag Føroya varð stovnað, og um hvussu "asfaltføringarnir" seinni, saman við eldsálum heima, eftir kríggið gróðursettu hesa ungu nálina í einum ikki altíð líka vinarligum føroyskum umhvørvi, er søgd fyrr og skal ikki verða endurtikin her.

Ein heilt avgerandi leiklut fekk Nonnegaard-Petersen, sum var stjóri í Føroya Banka árini 1954-69. Nýkomin til Føroya spurdi hann starvsfólkini í bankanum, hvat stovnurin plagdi at lata, tá ið gávur skuldu gevast. – Kongeligt porcelæn, var svarið, hann fekk.

– *Det skal være slut med det*, svaraði Nonnegaard. Síðani fór hann undir at keypa føroyska list, og tað vardi ikki leingi, til aðrir bankar og peningastovnar gingu í hansara sporum. Hetta var mentanarpolitikkur – so tað munti!

## List og politikkur

Áhugavert er, at Janus eftir kríggið hevði eina ætlan um at búgva eina tíð í Fraklandi, og at hann tí fór undir at læra seg franskt. Ætlanin var av ongum, men áhugin fyri tí franska helt sær, og eftir kríggið gekk Janus eina tíð til tímar í fronskum hjá Anton Pedersen, sum var lærari á Føroya Preliminer- og Studentaskeiði. Í bókasavninum hjá Janusi eru ikki fáar franskar útgávur, m.a. eftir Anatole France og Jean-Paul Sartre.

Politiskt var Janus sum nevnt, eins og eitt nú Jack Kampmann, Fraser Eysturoy og William Heinesen, at finna á vinstravonginum. Hann helt *Land og Folk* til tað seinasta. Verk sum *Karyatidur* og *Palestina-Dávid*, tað fyrra ein viðmerking til eitt verkfall í Havn og tað seinna ein sera kontant sipan til tann órætt, sum er framdur ímóti tí palestinsku tjóðini, eru dømir um, at hann eisini hevur skapt list við hvøssum politiskum profili.

Men hvussu við sambandinum millum list og politikk? Janus endurtekur nøkur orð eftir Harald Giersing: *Politisk kunst er ikke godt, men al god kunst er politisk*. Janus nevnir í hesum sambandi, hvussu lítið innlit summir listfrøðingar vísa, tá ið teir brúka ástøðið í staðin fyri hjartað ella skilið.

## Ein lýriskur dámur

- Hygg bara at Scherfig. Summir listfrøðingar dugdu ikki at fata, at hann bæði kundi vera kommunistur og skapa hesar naivu frumskógarmálningarnar. Listin sum útvegur rúmast ikki undir einum politiskum frymli.

Samanburðurin við Scherfig er beinrakin og kann, í ein vissan mun, fáast at sipa til Janus sjálvan. Eftir at Janus hevði virkað sum myndahøggari í meira enn ein mansaldur, fór hann undir at skapa litað prent, har motivini ofta eru tikin úr natúrini, seyður, fuglur, hvalir, áir í andarisi, pollamjørki í Havn, sveimandi summarnátt.

Hóast eingi av hesum verkum eru naiv ella naivistisk, ber til at siga um summi teirra, at her kemur til sjóndar ein lýriskur dámur, sum av góðum grundum ikki slapp framat í tí strongu høggmyndini. Onnur prent, eitt nú tann meistaraliga, stílførda myndin av ær og lambi - har ærin vendir høvdinum móti lambsins hala, meðan lambið sýgur, so høvdið á tí verður burtur undir mammuni, so tey bæði gerast ein savnað heild – eru sum seinasti varði á eini lívlangari ferð fram ímóti einfeldini.

Vit bíðja farvæl. Sum vit ganga burtur frá húsunum, er tað sum ein dámur av hvíld, vakurleika og ljósi hongur í okkara fótafari.

*Grundarlag undir hesi grein er tvær samrøður. Aðra gjørdu Poul Henrik Jensen og Hanus Kamban fyri tveimum árum síðani. Hina gjørdu Jóannes Dalsgaard og Hanus Kamban seinasta vikuskifti. Annars er bókin* Janus Kamban *eftir Gunnar Hoydal tann higartil besta keldan til vitan um Janus og hansara verk.*